# Umhvørvisgóðkenning

sambært kapittul 5 í Ll. nr. 134 frá 1988 um umhvørvisvernd

<table>
<tr><td colspan="2">Navn á virki við góðkenning:<br>P/F Fútaklettur</td></tr>
<tr><td colspan="2">Bústaður hjá virki:<br>Við Ánna 1, Postboks 29, 515 Gøta</td></tr>
<tr><td colspan="2">Galdandi fyri virksemi:</td></tr>
<tr><td colspan="2">Aling av laksi og síli</td></tr>
<tr><td>Aliloyvi.:</td><td>Alifjørður:</td></tr>
<tr><td>C-19</td><td>Miðvágur/Sandavágur,<br>Vágafjørður og Hestfjørður</td></tr>
<tr><td>Alistøð:</td><td>Aliøkið:</td></tr>
<tr><td>AS-03 og AS-29</td><td>A-27, Miðvágur/Sandavágur<br>A-89, Velbastað</td></tr>
<tr><td>Mál nr.:</td><td>Galdandi frá:</td></tr>
<tr><td>13/00448-25</td><td>20. juni 2014</td></tr>
</table>

Umhvørvisstovan, tann 20. juni 2014

Suni Petersen, deildarleiðari / Lena Ziskason, umhvørvisviðgeri

## 1. Umsókn

Umhvørvisstovan fekk hin 09. oktober 2013 umsókn frá P/F Fútakletti um umhvørvisgóðkenning av alivirkseminum hoyrandi til aliloyvi C-19 Miðvágur/Sandavágur, Vágafjørður og Hestfjørður. Aliloyvið C-19 umfatar tvey aliøki, A-27 í Miðvági/Sandavági og A-89 við Velbastað. Virksemið á A-27, Miðvágur/Sandavágur, hevur havt umhvørvisgóðkenning síðan 2002.

Umsóknin og móttikna tilfarið hava verið grundarlag undir viðgerðini av umsóknini. Eisini hevur Umhvørvisstovan havt fund við umboð frá P/F Fútaklett.

## 2. Góðkenning og heimild

Henda umhvørvisgóðkenning av alivirkseminum knýtt at aliloyvi C-19, er givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd við seinni broytingum og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, við seinni broytingum.

Sambært loyvisbrævinum frá Aliumsitingini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni, dagfest 28. juni 2002 er P/F Fútaklettur eigari av aliloyvinum C-19.

Henda góðkenning er givin til P/F Fútaklett, sum skal lúka tær treytir, sum eru nevndar í 5. parti, Góðkenningartreytir. Í sambandi við nevndu treytir, eru nevnd ymisk tiltøk, sum skulu útinnast av felagnum, fyri at tryggja, at umhvørvið verður ávirkað so lítið sum gjørligt av virkseminum, - sum henda góðkenning fevnir um.

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

Henda góðkenning kemur í staðin fyri umhvørvisgóðkenning av alistøðini hjá Fútakletti í Miðvági/Sandvági, HS mál nr. 615-200200387-11, dagfest 26. juli. 2002.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning ella loyvi eftir aðrari lóggávu.

## 3. Viðgerð

Sambært Aliumsitingin verður:

- Nýtt loyvisbræv bert útskrivað, tá aliloyvið verður endurnýggjað.
- Gjørt ískoyti til loyvisbrævið, um nøkur broyting verður í t.d. økisásetingunum ella um nýtt aliøki verður givið.
- Verður loyvisbrævið ikki útskrivað av nýggjum, um felagið skiftir eigara.

Undir viðgerðini av umsóknini og í sambandi við at áseta treytir er m.a. hetta tilfar nýtt:

- Vegleiðing: *Umhvørviseftiransing av aliøkjum*
- Norðurlendsk BAT-frágreiðing um aling: *BAT for fiskeopdræt i norden*
- Umhvørvisgóðkenning av alistøðini í Miðvági/Sandavági, mál nr. 615-200200387-11 frá 22. juli 2002

### 3.1. Málsviðgerð

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á,

- at P/F Fútaklettur fylgir við dálkingarstøðuni á aliøkinum, m.a. við at hava eina munagóða umhvørviseftiransing, sum m.a. fevnir um regluligar botnkanningar á aliøkinum,
- at virkið áhaldandi arbeiðir fyri at skifta evni, ið verða brúkt í sambandi við virksemið, út við meira umhvørvisvinarlig evni.
- at umhvørvisdálkandi evni í minst møguligan mun verða leidd út í umhvørvið,
- at innaneftirlit, umhvørvisstýriskipan og skrásetingar eru sambært viðurkendum skipanum,
- at umhvørvisliga best tøka tøknin (BAT[1]) í størst møguligan mun verður nýtt,
- at vandin fyri óhappum, sum kunnu hava dálking við sær ella at fiskur sleppur, skal minkast mest møguligt.

Stødd og staðseting av aliøkjum, har alivirksemið kann fara fram, er ásett í loyvisbrævi til aling á sjónum, sum er givið av Aliumsitingini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð sent alifelagnum, Heilsufrøðiligu starvsstovuni og Vága- og Tórshavnar kommunu til viðmerkingar.

Tórshavnar kommunu hevur í sínum viðmerkingum gjørt vart við, at tvær spillivatnsútleiðingar liggja útfrá Velbastað.

Vága kommuna spurdi í sínum viðmerkingum um tað er Umhvørvisstovan, sum fylgir við dálkingarstøðuni.
Tað er P/F Fútaklettur, sum skal fylgja við dálkingarstøðuni og Umhvørvisstovan skal fylgja við, at ásettar treytir verða hildnar. Eisini spurdi Vága kommuna, um kommunan ikki skal hava avrit av botnkanningunum. Botnkanningar verða kravdar sum partur av eftirlitinum hjá Umhvørvisstovuni.

P/F Fútaklettur og Heilsufrøðiliga starvsstovan høvdu ongar viðmerkingar.

[1] **Best Available Techniques**. Hugtakið *besta tøka tøknin* er at skilja sum mest framkomnu framleiðsluhættir, tilgongdir og rakstrarmannagongdir, sum til einhvørja tíð eru mest munadyggar fyri at fyribyrgja og avmarka dálking frá ávísari vinnugrein ella ávísum virksemi. Hugtakið fevnir ikki bert um tøkniligar loysnir, men eisini um t.d. nútímans framleiðsluhættir, nýtslu av minni dálkandi rávørum, avmarking av burturkasti, endurnýstlu og endurvinning, umframt nýtslu av rávørum og orku. Ein treyt fyri at koma undir hugtakið er eisini, at tøknin er roynd og tøk á marknaðinum fyri rímiligan kostnað.

### 3.2. Lýsing av virkseminum

Alivirksemið knýtt at aliloyvi C-19 umfatar alivirksemi á sjónum á aliøki A-27 í Miðvági/Sandavági og A-89 út fyri Velbastað og alivirksemið á tilhoyrandi landstøð AS-03 í Miðvági og AS-29 á Gomlurætt.

Umhvørvisgóðkenningin umfatar alt alivirksemið hoyrandi til aliloyvi C-19, Sandavág/Miðvág/ Vágafjørð og Heystfjørð.

Stødd og staðseting av aliøkjunum er ásett í loyvisbrævinum.

Felagið hevur hin 26. november 2013 fingið ískoyti til loyvisbræv dagfest 28. juni 2002, sum er eitt fyribils tíðaravmarkað royndarloyvi til aling á aliøki A89, Heystfjørður.

Økisáseting av A-27 í Miðvági er víst á myndini niðanfyri.




Økisáseting av A-89 við Velbastað er víst á myndini niðanfyri.



Aling byrjaði á Miðvági mitt í 80-unum, og hevur alivirksemi verið har síðani. Ætlanin er nú at seta fisk út á eitt nýtt aliøki við Velbastað, har fiskurin skal ganga í einar 3-4 mánaðir og síðan fluttur yvir á Miðvág. Í fyrsta umfari er talan er um eina roynd at ala út fyri Velbastað. Um royndirnar eydnast væl, ætlar felagið at søkja um endaligt loyvi at ala út fyri Velbastað. Hetta fyri at kunna ala meiri burðardygt uttan lús og sjúku.

Alivirksemið á Miðvági/Sandavági gongur út frá landstøðini, haðani aliútgerð og onnur vøra verður flutt við báti til og frá aliøkinum. Fóðurbátur flytur fóður beinleiðis út á ein fóðurflaka, sum liggur á aliøkinum. Ætlanin er at fóðurflakin skal fáa streym úr landi.

Tá fiskur verður settur út, verða fyrst smoltnótir brúktar, sum eftir eina tíð verða skiftar út við alinótir. Tær verða brúktar til fiskurin verður tikin.

Eftir at fiskurin er tikin, verða nótirnar tiknar upp. Tær verða síðan koyrdar til virki, sum vaskar skitnar alinótir, umframt umvælir og barkar (impregnerar) nótirnar av nýggjum, áðrenn tær kunnu brúkast aftur.

Fyri at forða fyri, at ov nógvur gróður kemur á nótirnar, verða tær barkaðar við evni, sum inniheldur kopar.

Um ov nógvur gróður verður á nótini kunnu nótirnar antin vaskast ella skiftast við nýggjar nótir.

Sambært norðurlendskari BAT-frágreiðing[2] um aling, vil áleið 20% av koparinum detta av og enda í umhvørvinum.

Útsetingin á Miðvági er vaksin nakað tey seinastu árini, frá at vera knapp 600.000 í 2007 til at vera góða millión seinastu útseting, sum var í mars 2012. Fyrr hevur smoltið viga áleið 100 g, tá tað verður sett út. Tey seinastu árini hevur felagið arbeitt miðvíst fram ímóti, at smoltið skal vera væl størri tá tað verður sett út. Seinastu útsetu hevur smoltið veri áleið 200 g. Fiskurin gongur vanliga í 15 - 20 mðr. á sjónum. Tíðin á sjónum verður stytt um útsettu smoltini verða enn størri. Seinastu árini er tøkan byrjað tá fiskurin er áleið 5 kg.

Tá fiskurin skal takast, verða ringar sleipaðir inn á Miðvág, har ein flytbar blóðgieind er. Harfrá verður fiskurin fluttur til sláturvirkið í Sørvági við bili. Tá økið er tómt, verða nótirnar tiknar upp og øll aliútgerð verður vaskað og sóttreinsað. Eftir hetta liggur økið brakk í í minsta lagi tveir mánaðir.

Deyður fiskur verður tikin upp í minsta lagi 5 ferðir um vikuna, og fluttur við báti inn á landstøðina, har hann verður malin, súrgaður og goymdur í einum tanga. Síðan verður hann fluttur til Salmon Proteins á Eiði.

# 4. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

## 4.1. Aliøki

*Miðvágur:*
Dýpið á staðnum er millum 17 og 25 m og stórur munur er á flóð og fjøru. Rákið fylgir sjóvarfallinum og melur mest í klingur og sambært botnfrágreiðing frá Havlívfrøðiligu royndarstøðini er mett, at útskiftingin á firðinum er góð.

[2] BAT for fiskeopdræt i Norden, publikationsdato 25. april 2013.

Botnkanningar eru gjørdar á økinum síðan 2001 og sambært frágreiðingunum er botnurin rættiliga javnur og botntilfarið er í høvuðsheitum sandur við nakað av grúsi.

*Velbastað:*
Dýpið á staðnum er millum 23 og 26 m, og rættiliga stórur munur er á flóð og fjøru, sum er sjóvarfallstengt. Havlívifrøðiliga royndarstøðin hevur mett, at útskiftingin er góð á økinum.

Økið er nýtt, og undankanning av botninum er gjørd á økinum í des. 2013 og sambært frágreiðingini er botnurin sandur og steinabotnur.

Frá sjálvari alingini er ávís dálking, sum m.a. stavar frá fóðring og skarni. Fóður sum ikki verður etið, søkkur niður á botnin, har tað saman við skarni frá fiskinum kann hópast upp. Fóður inniheldur evni, sum kunnu dálka umhvørvið, m.a. lívrunnið tilfar og sink. Harafturat kann fóður innihalda heilivág og onnur kemikalii.

Ein onnur orsøk til at dálking kann koma fyri, eru evni, sum eru nýtt til viðgerð av aliútgerðini. Her er tað serliga kopar, sum er í impregneringarveskuni, sum alinótir verða viðgjørdar við. Kopar verður nýtt, tí tað virkar sum gróðurtálmari, t.v.s. tálmar vøkstri á nótunum. Meðan tær viðgjørdu nótirnar liggja í sjónum, detta smáflakar av impregneringini við tíðini niður á botnin og kunnu hópast upp har.

Harafturat kann aling ávirka umhvørvið um eitt nú sjúka kemur í og villur fiskur verður smittaður og um alifiskur sleppur.

Treyt verður sett til, at alifelagið ger regluligar botnkanningar á aliøkinum. Kanningarnar skulu gerast sambært vegleiðing frá Umhvørvisstovuni , *Umhvørviseftiransing av aliøkjum.* Hetta fevnir m.a. um kanningar av sedimenti, sum verður tikið beint undir ringunum og á aliøkinum annars. Sýnini verða kannað fyri dálking, sum stavar frá fóðring, skarni, evnum nýtt til viðgerð av aliútbúnaði, heilivági og kemikalium, sum m.a. kunnu verða brúkt í samband við avlúsing.

Fyri at tryggja gott vatnútskifti undir ringunum, verður treyt sett til, at ávís frástøða er millum tað niðasta av alinótini og havbotnin.

## 4.2. Burturkast

Tað er nakað av burturkasti frá einum alivirksemi, so sum lívrunnið burturkast, tómir fóðursekkir o.a.

Alt vanligt burturkast verður skilt og goymt í hóskandi íløtum, áðrenn tað verður latið góðkendum móttakara.

Á alistøðini á landi verður alt lívrunnið burturkast samlað. Tað verður malið, tilsett meyrusýru og síðani goymt í tanga, til tað verður latið Salmon Proteins á Eiði.

## 4.3. Annað

Ein lítil starvstova er bæði á landstøðini í Miðvági og Gomlurætt. Nakað av spillivatn kemur frá virkseminum her, sum verður samlað í lokaðan tanga. Tá hesin er fullur, verður spillivatnið klorað og síðan leitt út. Mett verður ikki, at hetta hevur týdning fyri dálkingarviðurskiftini.

Á landstøðini er ein lítil goymsla til kemikalii. Harafturat kann virksemið á landi geva nakað av óljóðið. Tí verður fyrilit tikið fyri hesum í treytunum.

Um nakað arbeiði verður gjørt í samband við alivirksemi og arbeiðsljós verða nýtt, skal hetta ikki elva til ampar. Harafturat verða undirvatnsljós sett í ringarnar, sum lýsa tað myrku tíðin. Hetta skal forða

fyri, at fiskurin gerst kynsbúgvin og fyri at hann skal vaksa skjótari. Fyrilit verður tikið fyri hesum í treytunum.

Um vánaligt veður er, kann útgerð, burturkast o.a. sum verður goymt, fara á flog og elva til dálking og ampar í náttúruni. Fyrilit verður tikið fyri hesum í treytunum.

Felagið er ígongd við eina royndarætlan við at brúka rognkelsi sum lúsa átari. Verða royndirnar góðar, verða helst rognkelsi sett út á fleiri økir hjá felagnum. Rognkelsini verða sett út saman við fiskinum og tikin aftur tá fiskurin verður tikin. Vitanin um at nýta rognkelsi sum lúsa átari og um tey ávirka dálkingarviðurskiftini er enn avmarkað. Treyt verður sett til, at um felagið fer at nýta rognkelsi sum lúsa átara, skal P/F Luna senda eina umsókn, saman við eini frágreiðing um royndirnar við at nýta rognkelsi, til Umhvørvisstovan, sum síðan skal góðkenna nýtslu av rognkelsi sum lúsa átara.

## 5. Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er givin við hesum treytum:

### 5.1. Almennar treytir

5.1.1. Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og verða kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á.

5.1.2. Virksemið skal vera sum ávíst í aliloyvinum og skal einans fara fram á aliøkinum, sum er ásett í loyvinum ella til eina og hvørja galdandi ískoyti.

5.1.3. Um økisásetingin verður broytt, skal P/F Fútaklettur boða Umhvørvisstovuni frá hesum.

5.1.4. Allar sýnistøkur, kanningar v.m. sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini skulu gerast av starvsstovu, sum kann góðkennast av Umhvørvisstovuni.

5.1.5. Allar sýnistøkur, kanningar, metingar av úrslitum og metingar annars verða goldnar av felagnum.

5.1.6. Virksemið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið økir um útlát ella vanda fyri útláti, fyrr enn góðkenning er fingin til hesa víðkan ella broyting.

5.1.7. Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni. Um virksemið heldur uppat, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur.

5.1.8. Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin kann bert verða givið boð ella forboð, um so er at:

- ampar verða av virkseminum, sum ikki kundu síggjast tá góðkennignin varð givin,
- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingar-/skaðaárin,
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin, ella
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

5.1.9. Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í hesi, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

## 5.2. Virksemi

5.2.1. Virksemið skal vera sum ásett í aliloyvinum ella tilhoyrandi ískoyti fyri alifjørðin.

5.2.2. Um P/F Luna fer at nýta rognkelsi sum lúsa átari, skal felagið senda eina umsókn, saman við eini frágreiðing um royndirnar við at nýta rognkelsi, til Umhvørvisstovuna, sum síðan skal góðkenna nýtsluna.

5.2.3. Miðast skal eftir at nýta bestu tøku tøknina BAT og at virkið heldur øll útlát so lág sum gjørligt.

5.2.4. Aliútgerð, sum verður brúkt, skal vera gjørd til at klára aldu- og streymviðurskiftini á økjunum.

5.2.5. Goymslur til útgerð, burturkast o.a. skal tryggjast soleiðis, at tað ikki fýkur, elvir til ampar ella er atvold til dálking í náttúruni.

5.2.6. Hølir, ið nýtt verða til goymslu av kemikalium o.ø., skulu hava tætt undirlag.

## 5.3. Umhvørvisstýring

5.3.1. Felagið skal hava ein umhvørvisstýrisskipan, sum er samsvarandi viðurkendum skipanum.

5.3.2. Umhvørvisstýrisskipanin skal m.a. innihalda mannagongdir fyri stýring av alivirkseminum á sjónum, viðlíkahald, skráseting, dálkingaravmarkandi tiltøk, fyribyrging av óhappum o.a..

5.3.3. Umhvørvisstovan skal hava avrit av umhvørvisstýrisskipanini og tilhoyrandi mannagongdum.

5.3.4. Um nøkur broyting verður gjørd í umhvørvisstýrisskipanini skal Umhvørvisstovan kunnast um hetta.

5.3.5. Felagið skal seint á sumri á hvørjum ári gera kanningar av botnviðurskiftunum á aliøkjunum.

5.3.6. Kanningarnar skulu m.a. fevna um kanningar av botninum fyri m.a. metallir, lívrunnið tilfar og sensoriskar kanningar.

5.3.7. Umhvørvisstovan kann krevja, at millumkanningar verða gjørdar á einum aliøki. Umhvørvisstovan skal góðkenna kanningarskránna og hvørjir parametrar millumkanningarnar skulu fevna um.

5.3.8. Botnkanningar skulu gerast sambært vegleiðing frá Umhvørvisstovuni *Umhvørviseftiransing av aliøkjum.*

5.3.9. Umhvørvisstovan kann krevja, at botnkanningarnar eisini skulu fevna um aðrar parametrar og djóralívskanningar.

5.3.10. Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið ger serligar kanningar fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkseminum, t.d. kanningar av avlúsingarevnum.

5.3.11. Avrit av botnfrágreiðingunum skulu sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. feb í avloysandi ári. Um neyðugt, kann Umhvørvisstovan krevja at fáa avrit av frágreiðingunum áðrenn 1. feb í avloysandi ári.

5.3.12. Í seinasta lagi 1. mars á hvørjum ári skal felagið senda eina aliætlan fyri økið. Ætlanin skal vera fyri eitt 1-ára skeið og fyri eitt 3- ára skeið.

5.3.13. Aliætlanin skal vísa, at felagið tekur atlit at úrslitunum frá botnkanningunum.

5.3.14. Í aliætlanini skal felagið vísa, at alingin fer fram á ein umhvørvistryggan hátt, soleiðis at dálkingin ikki fer upp um ásett mørk.

5.3.15. Um Umhvørvisstovan metir, at felagið í síni ætlan ikki hevur tikið atlit at úrslitunum frá botnkanningunum, sum eru gjørdar á økjunum, kann Umhvørvisstovan krevja:

- at ætlaða nøgdin at seta út verður minkað,
- at ætlaða útseting verður flutt á annan part á aliøkinum,
- at ongin aling verður á aliøkinum ella pørtum av tí í ávísa tíð.

## 5.4. Óhapp

5.4.1. P/F Fútaklettur skal hava niðurskrivaðar mannagongdir fyri fyribyrging av óhappum og hvat skal gerast um óhapp hendir, t.d. um fiskur sleppur.

5.4.2. Um dálking kemur fyri vegna óhapp[3], aliútgerð fær stóran skaða, fiskur sleppur vegna veður ella annað, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til at avmarka avleiðingarnar.

5.4.3. Henda óhapp eitt nú við aliútgerð ella um fiskur sleppur, skal skjótast gjørligt fráboðast Umhvørvisstovuni. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk v.m. sendast Umhvørvisstovuni.

5.4.4. Har vandi er fyri spilli av kemikalium, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

## 5.5. Rakstarskráseting/Umhvørvisfrágreiðing

5.5.1. P/F Fútaklettur skal skráseta hesar upplýsingar:

- Tal og stødd av útsettum smolt pr. ár
- Tal og slag av slaktaðum fiski pr. ár
- Tal og vekt av deyðum fiski pr. ár
- Tal og vekt av slopnum fiski pr. ár
- Fóðurnýtsla pr. ár fyri hvønn ring ella alieind og fyri alt aliøkið pr. ár
- Fóðurfaktorur pr. eind ella aliøki
- Nøgd og slag av heilivági, kemikalium og avlúsingarevnum pr. aliøki pr. ár
- Nøgd av burturkasti, tilskilað slag og hvønn tað er latið til.
- Rakstrartrupulleikar/óhapp sum hava umhvørvisligan týdning.
- Onnur viðurskifti av umhvørvisligum týdningi.

5.5.2. Um rognkelsi verða nýtt sum lúsa átari, skal tal og stødd av útsettum rognkelsum, tal av deyðum rognkilsum, ið verða tikin upp, og tal av tiknum rognkelsum, tá útsetan er liðug, skrásetast.

5.5.3. Rakstrarskrásetingarnar skulu til eina og hvørja tíð kunna síggjast av eftirlitsmyndugleikanum, og skulu goymast í minsta lagi 5 ár.

[3] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).

### 5.6. Burturkast

5.6.1. Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[4], og skal latast til góðkendan móttakara.

5.6.2. Burturkast skal goymast í íløtum ella bingjum, sum eru egnað til endamálið, og skal standa soleiðis, at tað ikki elvir til dálking ella er til ampa.

5.6.3. Burturkast skal regluliga latast góðkendum móttakara, soleiðis at goymslurnar ikki gerast ov stórar.

### 5.7. Óljóð

5.7.1. Óljóð[5] frá virkseminum má ikki fara upp um virðini í talvu 1.

**Talva 1: Markvirði fyri óljóð - dB(A)**

| | **mán – frí kl. 07 – 18<br>leyg. Kl. 07 - 14** | **mán – frí kl. 18 – 22<br>leyg. kl. 14 – 22<br>sunnu- og halgidagar kl. 07 - 22** | **Allar dagar<br>kl. 22 - 07** |
|---|---|---|---|
| **Økið 1: Vinnuøkið, har larmandi virksemi kann fara fram** | 70 dB | 70 dB | 70 dB |
| **Økið 2: Vinnuøkið, har minni larmandi virksemi kann fara fram** | 60 dB | 60 dB | 60 dB |
| **Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki** | 55 dB | 45 dB | 40 dB |
| **Øki 4: Bústaðarøki** | 45 dB | 40 dB | 35 dB |

Markvirðini, sum eru sett í talvu 1, vísa, at um ein er staddur í t.d. økið 4, sum er bústaðarøki, millum kl. 22 - 07, er mest loyvda óljóð 35 dB frá virkseminum.

5.7.2. Um ampar verða av óljóði frá virkseminum, kann Umhvørvisstovan krevja óljóðsmátingar gjørdar, tó í mesta lagi einaferð um árið.

5.7.3. Um ampar verða av ljósum frá alivirkseminum, skulu neyðug tiltøk gerst.

## 6. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

**Avrit:** Tórshavnar kommuna, Postmoga 32, FO-110 Tórshavn
Vága kommuna, Innara bryggja 9, FO-370 Miðvágur
Heilsufrøðiliga starvsstovan, Falkavegur 6, 2. hædd, 100 Tórshavn
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postrúm 9, 110 Tórshavn

---

[4] Kunngerð nr. 147 frá 19. okt. 1995 um burturkast, broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. sept. 2007
[5] Ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðsstøðið í dB(A) í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.